# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Frits á Dunga 90

Hetta skal vera ein lítil heilsan til Frits Joensen ( á Dunga) í Sandavági, sum 10. oktobur fylti níti.

Tá tú sært Frits, gitir tú ikki, at hann kann vera 90, men sambært kirkjubókina slepst ikki uttan um tað. Hann koyrir bil enn og er av og á í Havnini og vitjar vinkonuna. Ongantíð lat hann seg smíða í Hymens leinkjur, ikki tí at hann ikki hevði kvinnutekki, men hann valdi so tað, kanska tí at umstøður og stundir ikki vóru til tess.

Sum so mangur annar unglingi tá í tíðini, byrjaði Frits við vaðbeini, og var tað við strandingunum umborð á Knørri. Síðan sigldi hann við øðrum skipum eitt langt áramál, m.ø. Vesturvarða undir krígnum, flekjari vi týskum trolara o.s.fr.v.

Mong ár var hann eisini við beiggjanum, tí kenda skiparanum Dunga-Jákupi, sum førdi skip í ein mansaldur. Frits var eisini av dúgligastu útrórarmonnum, bæði frá skipi í Grønlandi og á heimaleiðum. Eitt tíðarskeið koyrdi hann lastbil, sum hann sjálvur átti, og var hann millum teir fyrstu, sum átti privatan persónbil. Tá nógva saltfiskaarbeiði á landi fór fram, helst hevur tað veri í hálvtrýssunum, var hann arbeiðsformaður hjá Eivind Rasmussen.



Mest síggi eg Frits fyri mær við flekiborið á trolara, rokárini í Grønlandi, hann var hendinga kvikur vi flekinívinum, so tað var tætt við, at tveir fiskar vóru í luftini ísenn á veg niður í vaskipavnin.

Ikki at gloyma hevur Frits eisini fingist við seyð og var røktingarmaður eitt langt áramál.

Ikki var ætlanin, at hetta skuldi vera ein lívssøga, tí tað hevði verið alt ov drúgt, men óiva hevði hon verið ivaleysa so áhugaverd, sum mangar aðrar, hóast Frits, av einari ella aðrari orsøk, ongantíð gjørdist skipari.

So eg ynski tær alla eydnu á føðingardegnum, Frits, og framhaldandi góð ellisár. Takk fyri løturnar.

**Skipsfelagi**

## †

## Andlát og jarðarferðir

Rita Günther fer til gravar úr Marstal kirkju á Ærø mikudagin 12. oktober klokkan 12.

Tey, ið vilja minnast Ritu kunnu lata Zarepta eina gávu. Konto í peningastovnunum.

Kistan við Jóhannu Katrinu Debes, vanliga nevnd Janka, Oyri fór frá Landssjúkrahúskapellinum mánadagin klokkan 17. Jarðarferðin verður úr Norðskála kirkju týsdagin klokkan 14. Tey, ið vilja minnast Janku við blómum ella kransi kunnu í staðin lata eina peningagávu til Norðskála kirkju.

Daisy Elttør andaðist á Klaksvíkar Sjúkrahúsi hóskvøldið 6. oktober, 71 ára gomul.

Jarðarferðin var úr Betesda mánadagin klokkan 13:30.

Í staðin fyri blómur ella kransar kann gávu latast til Føroya Felag móti Krabbameini.

## Góvust at roykja – keyptu sangbøkur í staðin



Á tí lítla sjúkrahúsinum í Sisimiut við 16 seingjaplássum, hevur hin sangkáti økislæknin, Ove Rosing Olsen sína dagligu gongd. "Vit góvust at roykja, og keyptu okkum sangbøkur í staðin", sigur hann við einum brosi, meðan hann vendir bókablaðnum. "Nummar 52", kunnger hann fúsur og ferðugur, og letir síðani eftir tónanum. Og brátt rungar sangurin aftur. Læknar, skrivarar, sjúkrasystrar, vaskarífólk, reingerðarkonur, tolkar, ja alt, sum kann ganga á tveimum beinum og er til arbeiðis henda fríggjamorgunin, hevur leitað sær innar í kantinuna fyri at syngja saman við hinum.

"Eg havi starvað á mongum sjúkrahúsum", letur í einum donskum eygnalækna, sum er komin higar á 14 daga starvsvitjan, "men eg havi ongantíð upplivað nakað, sum líkist hesum nakrastaðni. Og hitt grønlendska málið er fyri so vítt ongin forðan. Royni sum frægast at fáa úttaluna so nøkulunda", leggur hann lændi afturat. Og fljótt tónar aftur frá hesum fróðligu kvæðakempunum, sum hvønn fríggjamorgun kl. 8.30 leita saman í ein hálvan tíma.

Stríðsøksin liggur helst undir grønutorvu. Hvør fær tikið lógvatak við starvsfelagarnar og vagga frá høgru til vinstru, meðan sangurin rungar - uttan so at viberatiónirnar eru góðar? Nei- tað ber slettis ikki til!

"Henda síðsta starvsdagin í vikuni treingja vit øll til ein uppstrammara", letur í einari eldri kvinnu. "Sangurin í morgun gevur okkum júst hetta tiltrongda piftið... og so hevur ein eisini yvirskot til at taka vikuskiftið við storm", letur í henni við einum skálkabrosi.

"Tosað verður nógv um smittuvandan við fuglakrími. Hesir kátu grønlendsku sangfuglarnir smitta hvør annan so tað forslær, og teir smittaðu eisini meg", sigur M.C. Restorff, sum gleðiliga lat seg feingja av sangkæti henda fríggjamorgunin í útnorði.

Sangfuglarnir verða at hoyra í sendingini "M.C. á ferð" í Lindini, týsdagin kl. 15 og mikukvøldið kl. 23.

### Dagurin

**11. oktober. Nikatius.** Grikki, sum í 2. øld boðaði evangeliið í Suðurfraklandi og stovnaði kirkjulið og saman við øðrum og bygdi kirkjur m.a. í Lyon. Hann og ein av monnum hansara, *Probus*, sum eisini hevur staðið í álmanakkanum, vóru tiknir av døgum av uppøstum heidningum.

*Nólsoyar Páll varð doyptur hendan dagin í 1766*

## Tøkk

Øllum tykkum sum á ymiskan hátt gleddu meg á 100 ára føðingardegnum 10. september, takki eg hjartaliga.
Ein serstøk tøkk til Eysturoyar Ellis- og Røktarheim og Fuglafjarðar kommunu fyri tykkara stóra beinasemi.

**Karin Joensen v/fam.**

## Andlitsmyndir í 3'aranum



*Komandi dagarnar fer 3'arin í SMS undir eitt nýtt og spennandi tiltak. Tað er í sambandið við at Jenny Weihe verður útlærd, at hon skipar fyri at taka andlitsmyndir. Til ber at taka myndir av einum ella fleiri persónum. Myndirnar kunnu útvegast í litum, svørtum/hvítum ella brúntónaðar. Til ber eisini at fá átta myndir í ymiskum støddum og eina fløgu.*

## Litmyndir av brúðarpørum í Vikuskiftis Sosialurin

Sum nakað nýtt seta vit nú allar myndir av brúðarpørum, sum vera sendar til til teigin "Heilsanir", í Vikuskiftis Sosialin í **litum**.

Brúðarmyndirnar koma undir somu treytir sum aðrar myndir til "Heilsan-ir", t.v.s. at tær kosta 30 kr.

***Síðsta freist at lata brúðarmyndirnar inn er hósdag kl. 12.00***

**Sosialurin**